Løgmaður fær ongan kanningarstjóra

Løgtingið samtykti í mikudagin, at eingir pengar skulu játtast løgmanni til at fáa ein løgfrøðing at gera eina niðurstøðu um embætisførsluna hjá Helenu Dam á Neystabø í pensjónsmálinum

John Johannessen

Vil løgmaður ikki taka eina støðu, um hvat skal skal henda við Helenu Dam á Neystabø í sambandi við embætisførslu hennara í pensjónsmálinum, hevur hann bert ein møguleika eftir.

Løgmaður kann nú bert royna at fáa 13 tigmenn at heita á formansskapin í løgtinginum um at seta ein kanningarstjóra.

Hetta gjørdist endaliga greitt á tingfundinum mikudagin.

Á hesum tingfundinum samtykti løgtingið eitt broytingaruppskot frá fíggjarnevndini til eykajáttanaruppskotið fyri september. Í broytingaruppskotinum mælir ein samd fíggarnevnd til, at strika umbidnu játtanina frá løgmanni, um at fáa 400.000 krónur til at gera eina løgfrøðisliga niðurstøðu í pensjónsmálinum.

Løgmaður verður helst einsamallur noyddur at meta um, hvørt pensjónsmálið skal fáa avleiðingar fyri Helenu Dam á Neystabø ella ikki

Tað var eisini eitt samt løgting, ið tók undir við hesum. Av teimum 28 tinglimunum, sum vóru á fundi, tá atkvøtt varð, atkvøddu allir fyri broytingaruppskotinum, og merkir hetta, at løgmaður ikki fær sett nakran løgfrøðing at gera eina niðurstøðu fyri seg.

Tí er eisini lítið sannlíkt, at seinasti útvegur løgmans, sum er at fáa 13 tinglimir at heita á formansskapin um at fáa kanningarstjóra, fer at eydnast.

Eydnast tað ikki løgmanni at fáa eina kanningarstjóra, er hann sambært stýrisskipanarlógini, sjálvur noyddur at meta um, hvørt málið skal fáa politiskar avleiðingar fyri Helenu Dam á Neystabø ella ikki.

62 búpláss tey næstu 5 árini

Almanna- og heilsumálaráðharrin hevur sett sær fyri í ár 2001, at serstovnurin í Klaksvík verður liðugur síðst í árinum, og at hann kann hýsa 10 brúkarum

Ólavur í Beiti

Tað var Katrin Dahl Jakobsen sum herfyri spurdi Helenu Dam á Neystabø, um almanna- og heilsumálaráðharrin hevur sett sær nøkur mál viðvíkjandi íbúðarmøguleikum hjá brekaðum, og sum skulu náast hetta valskeiðið. Eisini vildi spyrjarin hava at vita, hvussu henda ætlan fór at síggja út, og so varð spurt, um rættindi á sosiala og bústaðarliga økinum hjá teim brekaðu.

Í svarinum, sigur Helena Dam á Neystabø m.a., at verandi forsorgarlóg gevur okkum heimildina at útvega bústaðir til tey brekaðu, og fíggjarlógin gevur okkum tað fíggjarliga heimildina til sama endamál. Forsorgorlógin áleggur ikki myndugleikunum, at øll brekað fólk hava ein bústað.

– Sum skipanin er í dag, so velst skyldan at veita brekaðum hjálp til eina og hvørja tíð um játtanir, og hvussu langt játtanirnar røkka. Skal tað staðfestast við lóg, at landið eila møguliga kommununar hava skyldu til at útvega bústað til øll brekað eins væl og sálarliga sjúk, røktarsjúklingar, dementar borgarar og onnur, so er neyðugt at hækka játtanirnar til bæði fløgur og rakstur munandi. Hetta ber ikki til at gera í einum, sigur Helena Dam á Neystabø.

Tørvurin lýsast

Helena Dam á Neystabø upplýsur í svarinum, at hon hevur heitt á Serforsorgina um at lýsa tørvin sum heild, og hvussu Serforsorgin metir um langtíðartørvin. Serforsorgin hevur upplýst, at um bústaðartørvurin hjá menningartarnaðum og fólki við breki annars skal nøktast tey næstu árini, er neyðugt at útvega í minsta lagi 62 búpláss tey næstu 5 árini. Í uppgerðini eru bert fá av teimum sálarsjúku við, og av og á koma nýggir brúkarar á listan við bráðfeingis tørvi.

– Yvirlitið hjá Serforsorgini vísir eina ætlan, har 43 nýggj búpláss tey næstu fimm árini kunnu fáast tilvega, um neyðug játtan verður sett av til tess. Harav eru tey 20 skrásett sum »bráðfeingis« og 23 við aðrari raðfesting.

Viðvíkjandi serstovnurin í Klaksvík, verður upplýst, at hann verður liðugur síðst í árinum, og at hann kann hýsa 10 brúkarum, og almanna-og heilsumálaráðharrin roknar við, at búfólkið skal kunna flyta inn um árskiftið 2002.

– Somuleiðis havi eg sett mær fyri, at verandi bústovnar fáast at virka optimalt. Nakrir av stovnunum, sum virka í dag, eru ikki fult settir, og kunnu fimm fólk flyta inn á hesar. Mett verður, at játtanin, sum er avsett á fíggjarlógini fyri ár 2001, røkkur til hesi endamál. Vil væl til, verða vit møguliga før fyri at fremja aðrar smærri ábøtur næsta ár innan tann játtanarkarm, sum er avsettur.

4,6 mió. kr

Í fíggjarlógini fyri 2001 er skotið upp at játta eina millión til endamálið at bøta um viðurskiftini hjá teimum sálarliga sjúku. Við hesari upphædd metir Helena Dam á Neystabø ikki at loysa málið, men skjótul verður settur á ein alt ov gamlan og stóran trupulleika, og møguligt verður at fáa tilvega haldgott grundarlag hjá Løgtinginum at taka støðu til, hvussu vit í einari langtíðarætlan bøta um bústaðarviðurskiftini hjá sálarsjúkum, sigur almanna- og heilsumálaráðharrin.

Mett verður at stovnurin í Klaksvík fer at kosta 4,6 mió. kr., og peningur er settur av á fíggjarlógini til hetta.

10 mió. kr. til Norðskálatunnilin

Í 2001 verður loftið á tunlinum reinsað og betongsprænt fyri at tryggja loftið í framtíðini, sigur Bjarni Djurholm m.a. í svari til fyrispurning

Ólavur í Beiti

Er landsstýrismaðurin kunnugur við trupulleikarnar í Eysturoyartunnlinum? Nær ætlar landsstýrismaðurin at fara undir at loysa trupulleikarnar í tunnlinum? Í hvørji raðfylgu verða arbeiðini gjørd? Nær ætlar landsstýrismaðurin, at arbeiðið í Eysturoyartunnlinum skal vera liðugt? Hetta vildi Alfred Olsen, løgtingsmaður, hava at vita frá Bjarna Djurholm, samferðslumálaráðharra.

Í svarinum, sigur Bjarni Djurholm, sum nevnir Eysturoyartunnilin fyri Norðskálatunnilin, at hesin tunnil er ein sera týðandi partur av samferðslukervinum. Ferðslan er í miðal 2250 akfør um samdøgrið, 315 av hesum eru tung ferðsla, og tí er umráðandi, at tunnilin er í so góðum standi sum gjørligt.

– Hóast javna viðlíkahalds- og eftirlitsarbeiðið, so tørvar tunlinum umfatandi ábøtur fyri at dagføra og framtíðartryggja tunnilin, so at hann eisini lýkur nýggjastu galdandi krøv. Verður Norðskálatunnilin samanborin við bæði Leirvíkstunnilin og Kollfjarðartunnilin, er hann myrkur og vátur, og tørvur er á at asfaltera vegbreytina, sigur samferðslumálaráðharrin.

Liðugt í 2002

Og hann sigur, at ætlanin er at nýta 10 mió. kr. til Norðskálatunnilin næstu tvey árini. 4 mió. kr. eru settar av til endamálið í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2001, og 6 mió. kr. verða ætlandi settar av í 2002, tá arbeiðið eisini skal verða liðugt.

Og viðvíkjandi raðfylgjuni, sigur Bjarni Djurholm, at í 2001 verður loftið á tunlinum reinsað og betongsprænt fyri at tryggja loftið í framtíðini. Í 2002 verður vegbreytin fresað og asfalterað, vegaøkslirnar drenaðar og ljós, ventilatión og trygdarútgerð sett upp, soleiðis at tunnilin verður ljósur, turrur og sléttur at koyra ígjøgnum og trygdin enn betri.

Góða hálva millión árliga

Løgtingsformaðurin leggur nú uppskot fram viðvíkjandi Løgtingsins umboðsmanni, og verður lønin grundað á árligu lønina í 40. lønarflokki í tænastumannalógini, sum er uml. 526.000,- kr.

Ólavur í Beiti

Finnbogi Ísakson, løgtingsformaður, leggur í dag fram uppskot um Løgtingsins umboðsmann, sum verður samsýntur samvarandi 40. lønarflokki í tænastumannalógini, íroknað vanliga viðbót. Formansskapur Løgtingsins kann harumframt eftir umstøðunum veita umboðsmanninum eitt persónligt tíðindi, verður sagt í uppskotinum.

Sambært viðmerkingunum hjá løgtingsformanninum, verður kostnaðurin av lógaruppskotinum umleið 526.000,- kr., haraftrat koma 15% í avsetingum til eftirløn og møguligt persónligt ískoyti, íalt millum 600 og 650.000,- kr. árliga. Aftrat hesum koma so ávísar óregluligar útreiðslur, sigur løgtingsformaðurin í viðmerkingunum.

Ógegni

Viðvíkjandi spurninginum um ógegni, sigur løgtingsformaðurin, at tað hevur ikki borið til at funnið ein ráðiligan hátt at gera ítøkiligar lógarreglur fyri ta samsýning, ið skal verða veitt til tann, ið settur verður, tá umboðsmaður gerst ógegningur. Mannagongdin í okkara grannalondum er tann, at slíkt arbeiði verður gjørt upp á rokning, og hevur hetta í flestu førum ikki havt trupulleikar við sær.

Og viðvíkjandi farloyvinum sigur Finnbogi Ísakson í uppskotinum, at umboðsmaður hevur krav um farloyvi úr borgarliga starvi sínum, meðan hann er umboðsmaður og í starvi hjá tí almenna. Slíkt farloyvi eigur at verða viðgjørt eins og onnur farloyvi t.e., at umboðsmaðurin hevur rætt at koma aftur í starv, men hevur hann ikki krav um at fáa júst tað sama starvið aftur, sum hann hevði frammanundan.

Eingin umbering til Høgna

Jóannes Eidesgaard sýtir fyri at geva Høgna Hoydal og føroya fólki eina umbering fyri tað, hann segði um landsstýrið, tá tað vendi sær til ST í sambandi við samráðingarnar um fullveldi

John Johannessen

Formaður Javnaðarfloksins vil ikki geva Høgna Hoydal eina umbering fyri, at hann segði landsstýrið vera eina vittigheit, tá tað heitti á ST um at kanna møguleikarnar fyri at fáa ein triðja part upp í fullveldissamráðingarnar.

Hetta ger Jóannes Eidesgaard greitt í opnum brævi til Høgna Hoydal í bløðunum í dag.

Jóannes Eidesgaard sigur, at ein umbering er neyðug, um tú hevur borið teg skeivt at møti øðrum, og hann heldur, at tað ikki fer nakað av nøkrum okkara, um vit biðja um eina umbering, tá tørvur er á henni.

– Men hvørki tú, Høgni Hoydal, ella Føroya fólk, sum tú í reinari fáfongd hevur hug at seta líkheitstekin ímillum, fáa eina umbering frá mær um tað, sum eg havi sagt í ST-málinum ella øðrum málum av líknandi slag. Tey orð, sum eg havi sagt, tey standi eg við og vil fegin kennast við, sigur Jóannes Eidesgaard.



Jóannes Eidesgaard hevur sent Høgna Hoydal eitt hvast opið bræv, har hann sýtir fyri at koma við eini umbering fyri tað, hann hevur sagt í sambandi við, at landsstýrið herfyri vendi sær til ST um fullveldisspurningin

Barnalótir

Í brævinum finnist Jóannes Eidesgaard eins harðliga at Høgna Hoydal, sum Høgni Hoydal finnist at Jóannes Eidesgaard í brævinum, hann sendi út fyrr í vikuni.

Jóannes Eidesgaard sigur seg ikki kunna taka Høgna Hoydal í fullum álvara, tá hann sendir út eitt alment bræv við yvirskriftini »Eru føroyingar ein vittigheit ella ein serstøk tjóð?«.

– Ta einu løtuna helt eg satt at siga ikki, at ein maður í tínum starvi ikki hevði stundir til slíkar barnalótir, sigur Jóannes Eidesgaard í brævi sínum.

– Hetta opna brævið títt er eitt týðuligt dømi um mann, sum ber seg desperat at. Væl kann tað vera, at tú sært, at títt fullveldisprojekt ikki ber á mál, men hóast so, so mást tú taka tað sum ein maður í staðin fyri at skjóta tað til høgru og vinstru, sigur Jóannes Eidesgaard.

Formaður Javnaðarfloksins vísir Høgna Hoydal á, at hann heldur tað vera løgi, at samgongan altíð vil hava aðrar at siga okkum, hvørji vit eru. Í hesum sambandi sipar hann til frágreiðingina hjá Gudmundi Alfredssyni, ið staðfestir at Føroyar eru tjóð.

– Sjálvandi eru føroyingar ein tjóð, tað hava vit føroyingar altíð vitað. Men tá hesin spurningurin eftir øllum at døma er ein trupulleiki fyri teg og fyri Tjóðveldisflokkin, so kunnu tit sjálvsagt spyrja útlendingar. Men vælsignaðir menn gjaldið tað so sjálvir, sigur Jóannes Eidesgaard í brævinum til Høgna Hoydal.

Vil ikki spyrja stjórnina

Í almenna brævinum frá Høgna Hoydal til Jóannes Eidesgaard, heitti Høgni Hoydal á Jóannes Eidesgaard sum fólkatingslim, um at seta fram fyrispurning til donsku stjórnina, um hon metir Føroyar sum serstaka tjóð.

Men hetta ætlar Jóannes Eidesgaard sær ikki at gera.

– Eg kundi tað sama spurt teir, hvat klokkan var. Hví skulu aðrir og helst útlendingar siga okkum tað, sum vit frammanundan vita? Er hetta eitt tjóðveldiskompleks, ella er hetta enn eitt dømi um politiska ómegd, spyr Jóannes Eidesgaard.

– Skulu vit tosa um eina umbering, so kundi tú hóskandi biðið Føroya fólk um eina umbering fyri, at tú saman við samgonguni hevur lagt alt vanligt politiskt arbeiði lamið nú í skjótt hálvttriðja ár. Tú kundi hóskandi biðið Føroya fólk um eina umbering fyri at hava bilt teimum inn, at títt fullveldi ongar avleiðingar fær av nøkrum sum helst slag, sigur Jóannes Eidesgaard við Høgna Hoydal.

Formaður Javnaðarfloksins endar brævið við at heita á Høgna Hoydal um at gevast við at spæla politikk.

Skipbrotið fær ongar avleiðingar

Tjóðveldisflokkurin hevur gjørt av, at tað ikki skal fáa politiskar avleiðingar fyri Tórbjørn Jacobsen, at hann hevur fingið bót fyri at hava ábyrgdina av, at Halgafelli sakk í januar

John Johannessen

Á fundi millum ting- og landsstýrismanningina hjá Tjóðveldisflokkinum mikukvøldið gjørdi flokkurin av, at skipbrotið, sum Tórbjørn Jacobsen í januar var úti fyri og hevði ábyrgdina av, ikki skal fáa politiskar avleiðingar.

Tórbjørn Jacobsen skal bert rinda bótina, sum er 7.000 krónur, og framhaldandi greiða almenninginum frá øllum lutum í málinum.

Tjóðveldisflokkurin sigur seg í tíðindaskrivi vera samdan um, at tað er álvarsmál, um landsstýrismenn verða skuldsettir, ákærdir ella koma í rættin fyri brot á lóggávuna. Men samstundis vísir flokkurin á, at tað er neyðugt at skilja ímillum, hvat málið snýr seg um.

Politisk meting

Høgni Hoydal, formaður Tjóðveldisfloksins, sigur í tíðindaskrivinum, at tað í slíkum førum, sum hesum, er umráðandi at gera sær nakrar spurningar greiðar, áðrenn støða verður tikin.

Spurningarnir eru, um talan er um eitt mál, sum hevur við embætisførsluna hjá einum landsstýrismanni at gera, um talan er um brot á aðra lóggávu og um talan er um viljað, óviljað ella hediligt brot, um talan er um mál, sum eru avgreidd og kend ella talan er um annað, sum kann verða tyngjandi út frá eini politiskari meting.

Tá hetta er gjørt, heldur flokkurin, at ein politisk meting í hvørjum einstøkum føri má gerast, um hvørt brotið er tyngjandi fyri ein persón, ein politikara og ein flokk.

Skipbrotið hjá Tórbjørn Jacobsen fær ongar politiskar avleiðingar. Tá hann hevur rindað bótina á 7.000 krónur, er málið úti av verðini

Tað er júst hetta, Tjóðveldisflokkurin í hesum føri hevur gjørt. Og niðurstøðan er, at tað í hesum føri er talan um eina hending, sum var alment kend og væl lýst, áðrenn Tórbjørn Jacobsen gjørdist landsstýrismaður, og sum einki hevur við hansara embætisførslu at gera.

– Málið kemur upp, tí talan er um eftirfylgjandi verður um skuldseting fyri óviljað brot á sjólógina í sambandi við skipbrotið, sum skiparin hevur tikið fulla ábyrgd av, sigur formaður Tjóðveldisfloksins í tíðindaskrivinum.

Í hesum sambandi vísir hann eisini á, at tað sambært upplýsingum frá Sjóvinnufyrisitingini er vanlig mannagongd, at skiparar fáa uppskot um bót í sambandi við skipbrot.

– Talan er um hendiligt og óviljað brot, sum ikki fær nakrar víðari avleiðingar fyri skiparan, vísir Høgni Hoydal á.